# Gera havnarlag á Signabø

**Tórshavnar Kommuna hevur samtykt at broyta byggisamtyktina fyri Kollafjørð, soleiðis at økið nú verður havnarøki heldur enn vinnuøki. Eisini verður bryggjukantur gjørdur**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Heðin Mortensen, borgarstjóri og Jens Marius Poulsen, býráðsstjóri greiða frá ætlanum hjá Tórshavnar býráð*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Á býráðsfundi í Havn hóskvøldið samtykti Tórshavnar Býráð at gera broytingar í byggisamtyktini fyri Kollafjørð – fyri vinnuøkið á Signabø. Talan er um stóra økið, sum varð fylt upp við tilfarinum frá undirsjóvartunlinum um Vestmannasund. Í verandi byggisamtykt er økið lagt sum vinnuøki, meðan Tórshavnar Býráð nú hevur samtykt at økið skal verða havnarøki.

– Hetta økið hevur ligið í órøkt seinastu árini. Vit ælta nú at planera og asfaltera økið og gera ein bryggjukant, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Ætlanin er eisini, at hallir skulu kunna byggjast á økinum.

Borgarar í Kollafirði hava mótmælt ætlanini, m. a. tí, at hetta hevur óhepin árin á umhvørvið, og at tað ger liviumstøðurnar hjá íbúgvunum á Signabø verri. Eisini halda tey, at larmur o. a. í sambandi við bygging av bingjuhavn í økinum fer at hava minkandi sethúsavirði við sær.

Í samtyktini hjá býráðnum frá hóskvøldinum stendur, at ítøkiliga avgerðin, sum kommunan hevur tikið støðu til, kann lýsast við, at kommunan fær eina týðandi havnarútbygging fyri minst møguligan kostnað og við minst møguligum inntrivum í náttúruna og helst ongum eyka ampa samanborið við umstøðurnar í dag fyri borgararnar kring havnina.

Tey, sum hava kært, mæla til at leggja havnina úti á Spermi, men hesum tekur býráðið so ikki undir við.

Fyri málinum atkvøddu: Heðin Mortensen, Kári Árting (sum hevur sæti fyri Jógvan Arge), Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Inga Dahl (sum hevur sæti fyri Anniku Olsen), Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Í móti málinum atkvøddi: Beate L. Samuelsen, meðan Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov ikki greiddu atkvøðu.

# Bryggjurnar á Langasandi skulu bindast saman

**Fyri at betra viðurskiftini á bryggjuni á Langasandi í Kollafirði, verða bryggjurnar báðar bundar saman. Arbeiðið kostar 22 mió kr**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Hetta økið á Signabø skal nú verða havnarøki í framtíðini, um tað stendur til Tórshavnar Býráð. Men fyrst skal málið góðkennast í Innlendismálaráðnum*

Fyri samanleggingina millum Tórshavnar kommunu og Kollafjarðar kommunu í 2000 varð farið undir at gera ein 100 m langa bryggju á Langasandi í Kollafirði. Hendan bryggjan varð gjørd í sambadi við, at ein stór frystigoymsla varð bygd á havnaøkinum. Fyri at kunna nøkta tann tá akutta tørvin, varð bryggjan bygd 60 m eystan fyri tað verandi bryggjuna, framman fyri virkinum hjá Vestsalmon.

Í 2002 var farið undir at gera eina nýggja bryggju 100 m eystan fyri bryggjuna framman fyri frystigoymsluna. Meðan hendan bryggjan var í gerð, varð uppisjóvarvirkið hjá Kollafjørð Pelagic bygt.

Aftan á eina heldur stirvna byrjan, er rættulig gongd komin á virksemið á havnarøkinum.

Í 2003 vóru inntøkurnar fyri havnina í kollafirði umleið 1,3 mió kr.

Í 2005 eru inntøkurnar fyri havnina í Kollafirði mettar til 3,7 mió kr.

– Við verandi umstøðum er bert møguligt at avgreiða tvey skip samstundis. Hetta ger, at tað ofta er trupulet at avgreiða skipini, sum mugu bíða ella fara aðrastaðni, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Fyri at betra um umstøðurnar á havnarøkinum í Kollafirði verða bryggjurnar báðar bundnar saman. Hetta arbeiðið er mett at kosta 22 milliónir krónur, og var tað samtykt á býráðsfundinum hóskvøldið uttan atkvøðugreiðslu.

## Stórar ætlanir við vinnuøki í Kollafirði

**Stórt vinnuøki, bryggjukantur og atløgurampi til Norrønu verða gjørd á nýggja havnarlagnum á Signabø**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Virksemið á bryggjuni í Kollafirði er økt nógv seinastu árini. Virksemið hjá Kloosterboer Pelagic er vaksið so mikið nógv, at í framtíðini er ætlanin bert at hava virksemi, sum hevur við uppsjóvarfisk at gera.

– Tað er tí, at vit eru noydd at víðkað havnarøkið í Kollafirði, sigur Heðin Mortensen, sum vísir á ætlanina at broyta vinnuøkið Signabømegin til havnarøki.

Ætlanin er eisini at víðka vinnuøkið oman fyri vegin niðan móti landsvegnum.

– Í framtíðini eru eisini aðrar ætlanir á økinum. Tosað verður um at gera ein veg av Signabø niðan í landsvegin frá Kollafjarðartunlinum, soleiðis at tunga ferðslan frá havnarøkinum og vinnuøkinum kann fara beint út á landsvegin, sigur Heðin Mortensen.

Hann vísir eisini á, at tosað verður um at gera eina brúgv frá bryggjuni á Langasandi yvir um til bryggjuna á Signabø, har ætlnin eisini er at gera ein rampa til Norrønu.

– Hetta verður gjørt, soleiðis at vit altíð kunnu taka ímóti Norrønu, eisini tá tað ikki viðrar í Havn, sigur Heðin Mortensen.